

# Ongin ivi skal vera um sjúklinga-viðgerðina á Landssjúkrahúsinum

**HANS PAULI STRØM**
landsstýrismaður

Fríggjadagin t. 24. nov. svaraði eg fyrispurningi frá Bill Justinussen, løgtingsmanni, um viðurskifti á Landssjúkrahúsinum. Henda frágreiðing er ein samandráttur og dagføring av tí skrivliga svari, ið varð latið løgtingsmanninum t. 6. okt. 2006.

Fyrispurningurin í løgtingsmáli nr. 100-2/2006 var í 8 pørtum.

**Spurningar 1-4 verða tiknir fyrst undir einum**

Er landsstýrismaðurin vitandi um, at sjúklingaviðgerð á Landssjúkrahúsinum nú er merkt av líkasælu og tilvild?

Er landsstýrismaðurin vitandi um, at nógvir sjúklingar ikki hava álit á, at Landssjúkrahúsið er ført fyri at veita neyðugu viðgerðina, og tí velja at fáa viðgerð aðrastaðni - enntá fyri egna rokning?

Er landsstýrismaðurin vitandi um, at tað kemur fyri, at fólk, sum eru deyðiliga sjúk, verða vend í hurðini á Landssjúkrahúsinum, hóast tey eru ávíst hagar av kommunulækna?

Er landsstýrismaðurin vitandi um, at tað eisini eru dømi um, at sjúklingar við álvarsligum sjúkum verða sendir heimaftur uttan viðgerð, m.a. vegna vantandi samskifti millum læknar og aðrar starvsbólkar á landssjúkrahúsinum?

**Samandráttur av svarinum:**

Tað, sum spyrjarin her heldur uppá, eru álvarsamar skuldsetingar móti Landssjúkrahúsinum, sum hann ger alment galdandi út frá søgum, hann hevur hoyrt frá fólki. Spyrjarin heldur uppá, at viðgerðin á sjúkrahúsinum nú er merkt av líkasælu og tilvild, og har sjúklingar, enntá við deyðiligum sjúkum, verða sendir heimaftur uttan neyðuga viðgerð, og spyr, um landsstýrismaðurin er vitandi um tað.

Av tí at ikki ber til at fáa nærri upplýsingar frá spyrjaranum um hendingarnar, hann sipar til, er sera torført at fáa tær eftirkannaðar. Men eg meti ikki, at tað er rætt, at sjúklingaviðgerðin á Landssjúkrahúsinum er merkt av líkasælu og tilvild. Hinvegin er tørvur er á at kanna viðurskiftini nærri og tryggja, at góðskan er í lagi á sjúkrahúsinum. Hetta komi eg nærri inn á seinni í svarinum.

Eg haldi ikki, at tað er tað heilsufakliga virksemið á Landssjúkrahúsinum, sum er atvoldin til ákoyringarnar móti Landssjúkrahúsinum, men onnur viðurskifti, sum ávirka tað generella tænastustøðið tann skeiva vegin. Í fyrstu atløgu kunnu serliga nevnast tvey øki, sum kunnu elva til trupulleikar.

Manglandi røktar- og eftirviðgerðartilboð skapa trupulleikar á Landssjúkrahúsinum

Í sambandi við umleggingina til meira ambulant virksemi eru færri seingjarpláss og styttri innleggingartíðir á sjúkrahúsinum skerd. Endamálið við ambulantari viðgerð er at fáa eina effektivari nýtslu av tilfeinginum og at lyfta viðgerðirnar upp á eitt hægri støði. Sjúklingarnir sleppa skjótari heim aftur skjótari aftur á arbeiðsmarknaðin. Henda umlegging hevur tó eisini havt trupulleikar við sær, tí tilboðini í primersektorinum hava ikki fylgt nóg væl við, serliga fyri veik og óhjálpin. Her verður fyrst og fremst hugsað um manglandi røktarheimspláss, umframt at heimaróktin ikki hevur verið fyrireikað uppá eina størri arbeiðsbyrðu, sum umleggingin til økt ambulant sjúkrahúsvirksemi hevur havt við sær. Haraftrat hava vit enn onga útbygda rehabiliteringsskipan m.a. fyri uppvenjing eftir sjúkuviðgerð. Hetta hevur millum annað havt við sær, at seingjardeildin á G4 er yvirfylt, av tí at so torført er at útskriva sjúklingarnar, og í summum førum hava fólk eisini kent seg illa viðfarnan ella slept upp á fjall av Landssjúkrahúsinum, tá ið tey verða útskrivað.

**Rehabiliteringsætlan...**

Arbeitt verður støðugt við at loysa hesar trupulleikar. Viðvíkjandi rehabiliteringsætlanini er settur ein samskipari, ið burturav fer at fyriskipa arbeiðið í einum verkætlanarbólki við fakfólki við tí uppgávu at gera tilmæli um eina rehabiliteringskipan fyri Føroyar. Tilmælið skal handast landsstýrismanninum í seinasta lagi 1. apríl 2007. Harnæst verður uppgávan at fáa sett sjálva skipanina í verk.

**... og fleiri røktarpláss**

Fyri at nøkta meginpartin av tí stóra tørvinum á eldrabúplássum er farið undir ta stóru verkætlanina, sum tey næstu 2-3 árini kann fara at geva 136 nýggj búpláss á røktarheimum og eldrasambýlum. Hetta fer so hvørt at lætta um arbeiðsbyrðuna hjá heimaróktini. Haraftrat er samstarvsavtala gjørd millum Landssjúkrahúsið og Heimaróktina í miðstaðarøkinum um betri samskipan millum partarnar í sambandi við útskrivan av sjúklingum, ið hava broyttan ella øktan tørv á heimarøkt. Ætlanin er, at øll økini skulu verða fevnd av tílíkari samstarvsavtalu.

**Sjúklingahotell**

Eisini er ætlanin at betra um viðurskiftini á Landssjúkrahúsinum við einum sjúklingahotelli. Tey, sum bert hava tørv á gisting uttan størvegis yvirvaking, kunnu við bæði fíggjarligum og menniskjaligum fyrimuni vera á einum sjúklingahotelli. Hetta er uppá longri sikt raðfest í endurskoðaðu byggiætlanini, men ein fyribils loysn, ið verður viðgjørd í løtuni, er at nýta tann partin av barakkini, sum í dag verður nýttur til apopleksisjúklingar, til hetta endamál. Hesir sjúklingar flyta eftir ætlan yvir á B7 (gamla høvuðsbygningin) á vári 2007.

**Raðfestingarætlan fyri at styrkja serlæknaøkið**

Vandin fyri, at sjúklingar ikki verða nóg væl viðgjørdir ella kannaðir, er størri, tá ymisku serlæknagreinarnar eru ov illa mannaðar. Á Landssjúkrahúsinum

Vend